# HYGGJARIN DUGIR SJÁLVUR AT HUGSA

**BJARNI ÁRTING RUBEKSEN** ER MAÐURIN **AFTAN FYRI** EIN HÓP AV **DOKUMENTAR-SENDINGUM** Í SJÓNVARPINUM, **M.A.** SENDINGARNAR UM **VICTORIU WILD**, **DENNIS AGERBLAD** OG **1448** UM LØGREGLUFÓLK TIL ARBEIÐIS. HANSARA **FREMSTA** MÁL VIÐ **SENDINGUNUM** ER AT **VÍSA** FÓLKI TANN **ÓVÆNTAÐA** VERULEIKAN. HVAT **HYGGJARIN** HELDUR UM **VERULEIKAN**, BLANDAR HANN SEG **IKKI** UPPÍ, TÍ **HYGGJARARNIR** DUGA BEST AT **HUGSA** SJÁLVIR OG GERA **EGNAR** NIÐURSTØÐUR UM TAÐ, TEIR **SÍGGJA**, HELDUR HANN



**VANGAMYND**
**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Meiningarnar millum fólk vóru ógvuliga ymiskar, tá sendingin um føroysku stripparan, Victoriu Wild, hevði verið í sjónvarpinum 20. januar í ár. Var sendingin ov fúl? Var livihátturin hjá Victoriu Wild andstyggiligur? Tørvaði gentuni hjálp, tí hon dansaði fyri skjótiglaðum rokkarum, var kynsliga misnýtt og hugsaði um at gera sjálvmorð? Ella var tað kærkomið, at Kringvarp Føroya varpaði ljós á eina føroyska gentu í Keypmannahavn, sum kendi tað ov trongt í Føroyum, onga nøktandi hjálp tóktist at hava fingið og annars pilkaði glansin av føroyskum monnum, ið gera, sum teir vilja, á horuhúsum í danska høvuðsstaðnum?

Sendingin reisti eisini nógvar spurningar, og tað gjørdi eisini sendingin um samkynda Ova, ið hevði fingið sær navnið Dennis Agerblad. Hann dansaði saman við sínum vinmonnum í konufólkaklæðum, var giftur við sínum elskaða sjeiki og greiddi frá, at Tóroddur Poulsen hevði sæð hansara listarliga pissiling í Listaskálanum. Ja, ónda verð, soleiðis hevur skilið verið í Kringvarpinum í seinastuni. Var Dennis ein fittur mammusa drongur, ella tørvaði honum hjálp at gerast normalur? Ella var hann bara ok, men øðrvísi? Meiningarnar eru uttan iva ymiskar, og júst soleiðis vildi maðurin handan sendingarnar, Bjarni Árting Rubeksen, hava tað.

– Nógvir mátar eru at gera dokumentarsendingar. Fólk eru kanska mest von við at hoyra ein journalist siga søguna við orðum, og so eru samrøðubrot inni í frásøgnini, har fólk sita pen og pyntilig og úttala seg. Eg vil koma tættari í mínum frásagnum og vera sum flugan á vegginum við upptøkutólinum. Hyggjarin skal sjálvur tulka tað, hann sær og hoyrir, og taka støðu til veruleikan, um so veruleikin er bæði ónormalur og løgin. Eg geri altíð upptøkurnar við handhildnum kamera. Tá sleppi heilt tætt at fólki og fái sagt søguna so væl sum gjørligt, sigur Bjarni Árting Rubeksen, ið legði sendingarnar um Victoriu Wild og Dennis Agerbald til rættis saman við Elini í Stórustovu.

> **Sjónvarpið og Dimmalætting vóru herfyri og tosaðu við ein føroying, sum er í Afganistan og kanska má drepa fólk. Tá var onki rok. Eru silikonboppur vandamiklari enn ein alvápnaður hermaður?**

### Broytti stíl á Transit

Bjarni Árting Rubeksen er 48 ára gamal og hevur starvast í Kringvarpinum síðan í februar 1985, tá hann byrjaði í útvarpinum. Tann tá einans 23 ára gamli teknikarin fekk seg royndan frá fyrsta degi. Hann varð settur at gera ein útvarpsleik um Oliver Twist saman við Høgna Joensen. Bjarni minnist aftur á uppgávuna við einum longsulsfullum smíli, tí hon var fantastisk, heldur hann. Teir báðir gjørdu 12 partar á ein tíma hvør, og fleiri enn 100 fólk vóru við í leikinum. Arbeiðið tók eitt hálvt ár. Hetta var hansara kreativi elddópur sum loftmiðlamaður, eitt ódnartak, sum varð væl fagnað millum lurtararnar. Men sjónvarpsmiðilin dró meira enn útvarpsmiðilin.

– Dreymurin hjá mær var at sleppa at gera sjónvarp, tí eg havi altíð verið hugtikin av myndum. Eftir stutta tíð í útvarpinum fór eg so í sjónvarpið. Tað var 1. oktober í 1986, so nú havi eg skjótt 25 ára starvsdag sum sjónvarpsmaður. Eg eri sjálvlærdur fotografur og klippari. Tann fyrsta sjónvarpssendingin, eg var við at gera, var barnasendingin *Fram við Gjónni*. Hana gjørdu eg og Per Zachariassen saman við Zachariasi Hammer. Í míni tíð í sjónvarpinum havi eg gjørt fleiri enn 100 sendingar, eitt nú um listafólk, politistar, ølfjepparar, samar, djóralæknar, stripparar, samkynd og laksafiskarar, sigur Bjarni Rubeksen.

Kortini var tað ikki í sjónvarpinum, at hann menti sín serliga hátt at filma so livandi, sum hann ger. Í 1994 var hann upptøkumaður á donsku ungdómssendingini *Transit*, har Per Zachariassen var framleiðari. Á redaktiónini vildu tey gera upp við gamlar mátar at arbeiða uppá. Fotografarnir nýttu sjáldan stativ, tí teir vildu heldur hava upptøkutólini í hondini ella á økslini. Myndirnar vóru tí ófriðarligar, og klippini vóru ótolin sum ungdómurin sjálvur. Eftir tíðina á *Transit* slepti Bjarni stativinum og fór at filma við leysum kamera. Tað gav søgunum, hann vildi siga, ein heilt annan dynamikk. Uppaftur fleiri royndir fekk hann, tá hann sum fotografur arbeiddi saman við donsku skemtarunum, Timm og Gordon, í 1997 og var við til at filma *Den Store Mission* hjá TV 2 í 2000.

– *Den Store Mission* var ein stór framleiðsla við eini fíggjarætlan upp á tríggjar milliónir hvørja ferð, og vit gjørdu 10 partar. Eini 80 fólk arbeiddu saman um sendingina. Á *Transit* vóru vit 15 fólk, sum skuldu levera ein hálvan tíma hvørja viku. Tað var annað lív enn í Føroyum, her vit eru nógv færri at gera sendingarnar, sigur Bjarni Árting Rubeksen.

### Øll hava eina meining

Dokumentarsendingar eru mangan væl umtóktar, tí tær greiða frá veruleikanum á sera spennandi hátt. Hugtakandi eru sendingar um t.d. vanlukkur, politiskar søgugongdir og fløktar húsagangir, har tann alvitandi frásigarin greiðir frá, hvussu alt fór fram, og at enda tekur saman um orsøkirnar. Ein annar nógv brúktur háttur er so at siga frá einum lítlum petti av veruleikanum sum eygleiðandi frásigari. Tann eygleiðandi

▶